


www.oljan.fo

**Jan Müller** 19 - 05 - 2012

# Byggja fyrsta risapallin til Barentshavið

Flatan er líka stór sum ein fótbóltsvøllur, og vektin er 60.000 tons. Harafturat er Goliat-pallurin bygdur til at tola tað harða veðurlagið í tí arktiska økinum. - Hetta er ein stórhending fyri oljuútjaðaran í Norðurnoregi, og eg eri ovfarin av støddini, sigur Per Rune Henriksen, statsskrivari í norska olju- og orkumálaráðnum. Saman við umboðum fyri 20 norskar fyritøkur hevur hann verið í Suðurkorea og vitjað heimsins størstu skipasmiðju, Hyundai-skipasmiðjuna, og har sóu tey millum annað tann fyrsta oljupallin, sum eftir ætlanini verður í Barentshavinum næsta ár. Nýggjur kapittul Eitt serútgjørt og serbygt skip skal flyta Goliat-pallin hálva leiðina kring Jørðina, og tá pallurin er komin upp á pláss í Barentshavinum næsta heyst, byrjar ein nýggjur kapittul í tí norska oljuævintýrinum. Dagurin til ta nýggju byrjanina er settur til 1. november 2013. -Sum tann fyrsti pallurin í einari stórari oljuleið í Barentshavinum verður hann týdningarmikil. Ein triðingur av øllum gass- og oljutilfeinginum, sum vit ikki hava funnið enn, er í tí arktiska økinum, og Barentshavið er ein stórur partur av hesum øki. Pallurin er serbygdur til at tola viðurskiftini á hesum leiðum, sigur Per Rune Henriksen við Aftenbladet. Ein stórur partur av pallinum er bygdur við norskari tøkni, og eitt endamál við ferðini til Suðurkorea er at tryggja framhaldandi áhuga fyri norskari tøkni innan frálandavinnuna. Hetta er triðju ferð síðani 2010, at norskir undirveitarar eru í Suðurkorea.